# ítróttur

Nr. 173 • týsdagur • 13. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


## Meira ítróttur í morgin

Vegna plásstrot, var ikki rúm fyri øllum ítróttinum í blaðnum í dag. Greinar um Formel 1 kappkoyring og ein samanumtøka av 22. umfarinum í Formula-deildini verða tí í mikudagsblaðnum

**-mørk**

# Feløgini eiga allan rættin

**Enn er ikki avgjørt, hvørt FSF vil ganga við í eina kollektiva avtalul um rættindi at senda frá føroyskum ítrótti. Men tað sleppur FSF heldur ikki einsamalt at gera av. Rætturin til fótbóltsdystir liggur suverent hjá feløgunum**

UPPHAVSRÆTTUR

*Jákup Mørk*



*Kringvarpið, ÍSF og FSF kunnu samráðast so galið tey vilja. Ein avtala um rættindi at senda ljóð ella myndir frá føroyskum ítrótti kemur ikki upp á tal, uttan at einstøku feløgini eru partur av hesi*

Vilja feløgini ikki spæla við, so hava hvørki ÍSF ella FSF loyvi at gera nakra avtalu um rættin at senda ljóð ella myndir frá bestu føroysku fótbóltsdeildini. Somikið greið eru boðini frá Jógvan Páll Lassen, sakførara.

Orsøkin til spurningin skal finnast í greinum, sum vit skrivaðu her í blaðnum fyri tveimum vikum síðani. Her var spurningurin, hvørt tað skuldi eydnast Kringvarpinum at fáa eina avtalu við ÍSF, soleiðis at rættindini at senda ljóð og myndir frá dystum í Formula-deildini framvegis kunnu vera hjá almenna stovninum. Stóri knúturin her hevur verið, at almennu loftmiðlarnir konsekvent hava sýtt fyri at nýta heiti sum t.d. Formula-deildin í sínum sendingum. Ein støða, sum væl kann hava við sær, at FSF missir stóran sponsorsáttmála. Og tí segði FSF seg undir verandi fortreytum hava ringan hug at ganga undir eina kollektiva avtalu millum ÍSF og Kringvarpið.

### Feløgini hava bóltin

Stutt eftir hetta sendi KÍ út tíðindaskriv, har felagið sigur seg ikki kunna góðtaka framferðarháttin hjá ÍSF. Og at tey vilja hava, at tað skal verða FSF, sum skal samráðast vegna feløgini.

Og er hetta støðan hjá KÍ, so kunna hvørki ÍSF ella FSF í veruleikanum ikki gera tað heilt stóra.

- At skipa fyri ítróttartiltøkum er ein partur av lógini um upphavsrætt. Og í so máta eru slíkir dystir vardir á sama hátt, sum eitt nú konsertir, sjónleikir v.m. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað eru feløgini, sum suverent hava ræisrætt á, hvør - ella um nakar - sleppur at senda ella taka upp, tá slíkar hendingar fara fram.

- Lógin um upphavsrætt er klokkuklár í so máta, og hon varð eisini uppstrammað í 2001. Tað vil so siga, at gamla avtalan millum ÍSF og Sjónv- og Útvarpið sum so var í lagi. Men ein líknandi avtala kann ikki gerast í dag, uttan at einstøku feløgini geva sítt samtykki. Sjálvandi kann til dømis KÍ ikki her og nú bara siga seg úr eini avtalu, sum teir hava verið partur av. Men teir kunnu nokta at fara undir eina nýggja avtalu. Og tað sama kunnu øll onnur ítróttarfeløg í landinum eisini, staðfestir sakførarin.

### Kunnu eisini standa einsæris

Tað merkir í fyrstu atløgu, at FSF illa kann koma við einum bindandi svari til ÍSF, tá stjórnarfundur verður um málið í hesum mánaðinum. Í øllum førum skal FSF fyrst hava samband við øll føroysku fótbóltsfeløgini, og væntandi verður eitt slík mál ikki viðgjørt, fyrr enn í fyrsta lagi seint í heyst, tá árligi fundurin við feløgini er á skránni. Og halda vanligu mannagongdirnar, so hendir einki formligt í málinum fyrr enn á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum, sum verður í februar mánaði.

Og í aðru atløgu er heldur ikki víst, at ein aðalfundur kann greiða málið. Ein ímyndað støða, har kanska fimm feløg ikki taka undir við eini avtalu, ger í veruleikanum, at hesi fimm feløg ikki eru partur av henni. Óansæð um ein meiriluti á aðalfundinum hevur samtykt hendan. Tí meirilutin ræður altso ikki meira enn so, at tað er einstøku feløgini, sum suverent gera av, hvør sleppur at senda ella ikki frá teirra dystum.

## FSF tosar við feløgini fyrst

Tá vit mánamorgunin tosaðu við Óla Holm, og fyriløgdu honum reglurnar um upphavsrætt, var tað ein púrasta avkláraður formaður, sum vit tosaðu við.

- Hatta eru vit púrasta greiðir um. Eins og FSF hevur allan rættin, tá sendast skal frá landsdystum, so eru tað feløgini, sum hava rættin til sínar dystir, og tað verður so eingin avgerð tikin, uttan at feløgini eru við í hesari.

Men merkir tað ikki, at tit illa kunnu geva ÍSF nakað bindandi svar, tá stjórnarfundur verður í næstum?

- Jú, og tað fáa vit neyvan gjørt. Sjálvandi er FSF umboðið hjá føroysku fótbóltsfeløgunum, men í eini slíkari støðu eru tað feløgini sjálv, sum eiga avgerðina. Vit vita sjálvandi, hvar á leið vit flóta, men nakra bindandi avtalu um rættindini kunnu vit ikki gera, staðfestir formaðurin.

Hann sigur seg eisini vera greiðan um, at einstøk feløg í veruleikanum kunnu blokera eini samlaðari loysn fyri føroyskan fótbólt, men sjálvur roknar hann ikki við, at málið fer at draga so langt út.

- Eru feløg, sum ikki vilja ganga við í eini meirilutasamtykt, so er talan sjálvandi um ein juridiskan spurning, sum eg ikki fái svarað her og nú. Men eg hvørki rokni við ella vóni, at málið kemur somikið langt, áðrenn ein semja verður funnin, sum øll kunnu ganga við til, sigur formaðurin at enda.

**-mørk**

# Kappingin líkist sær sjálvari

**FCK hevur framvegis ikki tapt, og nýggja føroyska felagið hevur burturúr seks teimum síðstu dystunum bara fingið trý stig**

SUPERLIGAN

*Jóannes Hansen*

Í fyrrakvøldið á midnátt var ikki loyvt at keypa og selja spælarar í superliguni. Ein av síðstu flytingunum var, at Rógvi Jacobsen flutti úr KR í Reykjavík og til Haderslev og SønderjyskE, sum hevur leigað hann fyribils fram til nýggjárs.

Harvið eru tríggir føroyingar í bestu donsku deildini - Súni Olsen í AaB, Johan B. Hansen í Horsens og Rógvi Jacobsen.

Besta úrslitið hjá hesum trimum feløgunum megnaði í vikuskiftinum Horsens. Uppflytararnir vóru í Silkeborg, og har eydnaðist teimum at fáa øll stigini. Horsens vann 1-0, og harvið tvífaldaðu teir talið á málum, sum teir hava skorað í átta teimum fyrstu umførunum.

Johan B. Hansen var ikki á vøllinum í Silkeborg sunnudagin.

Súni Olsen var heldur ikki á vøllinum, tá ið AaB á heimavølli stóð fyri enn einum vónbroti í Aalborg. Heimaliðið svam í møguleikum, men tað vóru gestirnir úr FCN, sum løgdu seg á odda, tá ið teir fingu mál burturúr fyrsta og einasta málmøguleikanum. AaB javnaði, men áskoðararnir og AaB spælararnir vóru vónbrotnir av úrslitinum, sum avgjørt ikki var í samsvari við spælbýtið.

Súni Olsen var á næstbesta AaB liðnum, sum leygardagin vann 2-0 á útivølli í Danmarksseriuni. Teir spældu í Randers, og Súni Olsen skoraði seinna málið í 25. minutti.

Felagið hjá Rógva Jacobsen er næstaftast. Leygardagin taptu teir 3-0 í Brøndby. Harvið reisti Brøndby seg, eftir at teir næstsíðst vórðu hølvaðir av á útivølli móti AGF. Peter Sand er ein av nýggju liðfelögunum hjá Rógva Jacobsen. Hann er tvíburðabeiggi Ebbe Sand.

Brøndby er trý stig aftanfyri oddaliðið. Hóast teir í summar skiftu nógv fólk, so gongur tað strúkandi hjá FCK. Sunnukvøldið vunnu teir 2-0 í Odense. Í OB vóru teir vónbrotnir, tí teir í 1. hálvleiki høvdu havt gott tak á FCK. Nýggja álopsstjørnan hjá FCK, svenski landsliðsspælarin Marcus Allbäck, skoraði bæði FCK málini.

Í Herning vóru teir vónbrotnir av, at FCM ikki megnaði meiri enn 1-1 móti Viborg, sum í longum løtum var niðurspælt, og í Esbjerg stendur heilt illa til. Hesa ferð taptu teir 1-0 á heimavølli móti AGF. Harvið er støðan tann, at Esbjerg, sum undan kappingarbyrjan droymdi um at blanda seg millum fýra tey bestu, er aftast, og nú verður tosað um og gitt, at væl dámdi venjarin og fyrrverandi bankastjórin Ove Pedersen verður næsti venjarin í superliguni, sum fer at fáa sekkin. Esbjerg hevur bara fingið fimm stig burturúr átta teimum fyrstu umførunum.

Í 9. umfarinum, sum verður á skránni næsta vikuskifti, sær skráin soleiðis út: AGF-AaB skulu spæla leygardagin, og sunnudagin verður spælt soleiðis: OB-Silkeborg, FCN-Horsens, SønderjyskE-Esbjerg, Viborg-Brøndby og FCK-FCM.